# Lívfrøðingar

## til Havlívfrøðiligu royndarstøðina

**Á Havlívfrøðiligu royndarstøðini í Kaldbak hava vit brúk fyri tveimum lívfrøðingum**

**BS Lívfrøðingur**
Vit hava brúk fyri einum lívfrøðingi á BS-støði til alt vanligt arbeiði í samband við sýnistøku av botndýrum, varveitandi viðger av sýnum, navngreining av ryggleysum dýrum, og at skriva smærri frágreiðingar.

Fyrimun hava tey, sum hava royndir í at navngreina føroysk ryggleys dýr í sjónum, og at taka lívfrøðilig botnsýni. Tað er eisini ein fyrimunur at hava koyrikort, førleika at sigla smærri før, t.d. dugnaskapsroynd í sigling og trygdaskeið á sjónum.

Løn samb. sáttmála millum Magistarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**Lívfrøðingur**
Vit hava brúk fyri einum lívfrøðingi til smáar og miðalstórar verkætlanir í samband við árinskanningar av havbotninum. Eisini er neyðugt at luttaka í sjálvum innsavningararbeiðnum og at duga at navngreina føroysk ryggleys dýr í sjónum. Tað er neyðugt at viðkomandi, ið settur verður, skal kunna átaka sær ymiskt viðkomandi arbeiði.

Tað er eitt krav at hava góðan kunnleika til bæði enskt og føroyskt, at hava kunnleika til teldunýtslu yvirhøvur, og serliga forritini Word, Excel.

Fyrimun hava tey, sum hava royndir í at skriva árinsfrágreiðingar, at navngreina føroysk ryggleys dýr í sjónum, at taka lívfrøðilig botnsýni. Tað er eisini ein fyrimunur at hava koyrikort, førleika at sigla smærri før, t.d. dugnaskapsroynd í sigling og trygdaskeið á sjónum.

Løn samb. sáttmála millum Magistarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Størvini verða at seta skjótast gjørligt, og umsóknir við prógvum og cv. skulu sendast til Havlívfrøðiligu royndarstøðina, Mjólkargøta 3, 180 Kaldbak, og vera okkum í hendi ikki seinni enn 28. mars. 2007.

**Havlívfrøðiliga royndarstøðin · Tlf 356111**

# Hotel Bólið til sølu

Matr nr 772h og 777f í Tórshavn Niels Finsensgøta 51. 3 hæddir á 100m$^2$ hvør. Bygningurin er sera væl hildin og er í góðum standi. Vindeyguni eru nýggj, og allir veggirnir eru nýliga bjálvaðir. Útsýni er gott.

Ein perla í býnum.

Selist um nøktandi boð fæst.

**Húsasølan Sertænastan**
Partafelagið Búgv · N. Finsensgøta 51
TLF 213303 · bugv@kallnet.fo

## Eysturoyar Røktar-og ellisheim

# FYSIOTERAPEAUTUR

Søkt verður eftir fysioterapeuti at byrja 16 apríl 2007 ella eftir nærri avtalu.

Hevur tú hug at arbeiða fulla tíð ella í minsta lagi 0,75 tíð, ert tú vælkomin at søkja.

Stórur dentur verður lagdur á, at trivnaður bæði fyri búfólk og starvsfólk framvegis eyðkennir heimið og vænta vit tí av tær, at tú hevur áhuga og gleði við, at samskifta við eldri fólk og at tú hevur vilja og eginleikar at samskifta við starvsfólk og avvarðandi.

Hevur tú ikki fysioterapeutiska útbúgving, men royndir innan eldraøkið og hug at arbeiða saman við einum fysioterapeuti, ert tú vælkomin at søkja og verður, um eingin fysioterapeutur søkir, sett/ur í fyribils starv sum hjálparfólk.

Lønar og setanarviðurskifti eru sambært galdandi sáttmála.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ingelise Sørensen, fysioterapeut á tlf. 478200

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Eysturoyar røktar- og ellisheim**
att: fyristøðumaðurin
Friðartún
620 Runavík

**Umsóknarfreist:** Umsóknin skal verða okkum í hensi í seinasta lagi 04. apríl 2007 , kl. 12,00

## Eysturoyar Røktar-og ellisheim

**Til »Heimið á Mýrunum«, Runavík verður søkt eftir**

# FRÍTÍÐARAVLOYSARUM

fyri skjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar/sjúkrahjálparar og heilsuhjálparar í tíðarskeiðnum 01. juni - 31. august 2007.

Umsóknarfreist: 10.04.07.

Nærri størvinum viðvíkjandi fæst at vita frá Unn Justinussen, 1 assistenti á tlf. 277265.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Eysturoyar røktar- og ellisheim**
att: fyristøðumaðurin
Friðartún
620 Runavík

FVE FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
Faroe Islands Fisheries Inspection

# Eftirlitsfólk

## til Fiskiveiðieftirlitið

**Eitt starv sum eftirlitsfólk hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, at seta sum skjótast.**

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- At luttaka í eftirliti av t.d avreiðingum, uppskipingum, umskipingum, avskipingum, og annars øllum tí, ið stendst av hesum.
- At luttaka í eftirlitsarbeiði, saman við øðrum eftirlitsstovnum.
- At luttaka í eftirlitsarbeiði saman við útlendskum myndugleikum, samsvarandi avtalum um millumtjóða eftirlitssamstarv.
- At luttaka í dagliga arbeiðinum á skrivstovuni.

**Førleikakrøv:**
- Fiskivinnuútbúgving ella aðra relevanta útbúgving.
- Heilsuprógv til sjófólk er ein fyrimunur, tó ikki krav.
- Góðan førleika, at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli.
- Góð samstarvsevni.
- Koyrikort til persónsvogn.

**Setanartreytir:**
Starvsheitið er »Eftirlitsfólk«. Starvið er lønt í lønarflokki IV sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna.

Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Tann ið verður settur, skal tola, at arbeiðstíðin í stóran mun verður tillaga arbeiðsuppgávuni.

Tann ið verður settur, kann rokna við, at uppgávur, so sum at ganga uppá skip í truplum umstøðum, verður ein partur av dagliga arbeiðinum.

Tann ið verður settur, eigur at tola broytingar í starvinum, um so er, at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum, skal vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi, í seinasta lagi klokkan 12:00 hin 10. apríl 2007.

**Fleiri upplýsingar:**
Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið á tlf. 31 10 65 og tosa við Jóannes Heimustovu ella Jóhan Simonsen. Lýsingin er eisini at finna á heimasíðuni: www.fisk.fo

## Heilsuhjálparafelag Føroya

Ársaðalfundur felagsins verður á Hotel Føroyum leygardagin tann 21. apríl kl. 10.00

Skrá sambært lógum felagsins.

***Nevndin***